Løgtingið

10. mars 2008
Mál**:** 403-013/05

**Løgtingsmál nr. 168/2007: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum mát og vekt)**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum mát og vekt)**

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum við seinni broytingum verður § 1, stk. 2, nr. 12 strikað.

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi ólavsøkudag 2008.
.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkið mát og vekt. Politiskt er henda yvirtøka avtalað í samgonguskjalinum hjá verandi samgongu frá 4. februar 2008.

Við uppskotinum taka føroyskir myndugleikar yvir lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkinum mát og vekt.

Vanligt er, at eftir yvirtøkuna og áðrenn nýggj løgtingslóggáva er gjørd, galda lógirnar á økinum framvegis sbr. yvirtøkulógini § 5 jbr. heimastýrislógarinnar § 13, um tær ikki verða broyttar, ella settar úr gildi, samstundis sum yvirtøkan fer fram. Heimildir og skyldur, sum liggja hjá donskum myndugleikum í nevndu lógum, verða tá av sær sjálvum fluttar avvarðandi føroyskum myndugleika sbr. ræðislógini § 2.

Í dag er henda lóggáva galdandi á økinum:

A.nr. 720 af 05.09.1995 om ikrafttræden på Færøerne af lov om erhvervsfremme §§ 10, 11, 12, 13, § 14 og 16.

- A. nr. 603 af 18.11.1918 om forkortede betegnelser for metrisk mål og vægt.
- B. nr. 84 af 01.03.1950 om Justerreglementet, som den senest er ændret ved B. nr. 22 af 31.01.1972.
- B. nr. 415 af 01.06.2004 for Færøerne om foreløbig ordning vedrørende måleteknisk kontrol.
- B. nr. 416 af 01.06.2004 for Færøerne om udstedelse og gennemførelse af måletekniske bestemmelser.
- B. nr. 417 af 01.06.2004 for Færøerne om kontrol med måling af fjernvarme i afregningsøjemed.
- B. nr. 418 af 01.06.2004 for Færøerne om måletekniske kontrolbestemmelser for ikke-automatiske vægte.
- B. nr. 419 af 01.06.2004 for Færøerne om akkreditering til certificering af miljøsystemer og til miljøverifikation.
- B. nr. 420 af 01.06.2004 for Færøerne om måletekniske kontrolbestemmelser for måling af mass ("vægt")
- B. nr. 421 af 01.06.2004 for Færøerne om EØF-typegodkendelse og -verifikation.

Við hesum uppskoti verður bert støða tikin til spurningin um, at føroyingar fáa lóggávu- og fyrisitingarrætt á økinum. Innihaldsliga stendur verandi lóggáva óbroytt við, og verður møguligur spurningur um at dagføra lóggávuna at taka upp við eitt seinni høvi.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

Arbeiðseftirlitið umsitur økið mát og vekt. Í praksis merkir hetta, at Arbeiðseftirlitið kannar og verifiserar:

1. vektir og
2. volumenmátarar.

Hetta eru vektir til ymisk vinnulig endamál, sum t.d. í fiskivinnuni og í handlum, meðan volumenmátarar fyri tað mesta eru olju og bensinmátarar á bensinstøðum o.l.

Herumframt eru nógv onnur viðurskifti at umsita, t.d.:

1. Momentlyklar
2. Betongstyrki
3. Fjarhiti
4. Elmálarar

Í løtuni er bert ein persónur á Arbeiðseftirlitinum knýttur at mát og vekt. Hann arbeiðir á Arbeiðseftirlitinum, men undir treytum frá FORCE, sum er ein løggild certifiseringsfyritøka.

Tað hevur tikið fleiri ár at fáa hendan persónin á tað góðkenningarstøði, hann er á í løtuni. Tað er tí ikki løtuverk at arbeiða við hesum viðurskiftum.

Soleiðis hevur hann alla organisasjónina FORCE og harvið eisini alla skrásetingina hjá FORCE til taks og fylgir teirra príspolitikki.

Við yvirtøkuni av mát og vekt er skilabest at halda fram við verandi skipan, tó so at tað helst gerst neyðugt at endurskoða samstarvsavtaluna millum Arbeiðseftirlitið og FORCE.

Útreiðslurnar av skipanini við FORCE skulu í mestan mun vera útreiðsluneutralar, av tí at persónurin, sum við góðkenning frá FORCE útinnir arbeiði sítt, ger hetta móti gjaldi frá tí, sum fær tænastuna. Av tí, sum goldið verður fyri tænastuna, fær FORCE ein avtalaðan part, meðan Arbeiðseftirlitið fær ein minni part.

Roknast má við, at útreiðsluparturin hjá Arbeiðseftirlitinum upp á umleið 100.000 kr. í besta lagi verður óbroyttur, ella kann tað fara at snúgva seg um eina minni hækking – í mesta lagi 150.000 kr. Hesin peningur verður í dag fingin til vega yvir játtanina til Arbeiðseftirlitið. Sostatt verður yvirtøkan útreiðsluneutral – eftir omanfyri nevnda leisti.

Um Arbeiðseftirlitið uppsigur avtaluna við FORCE og skipar løggildingarstovn rakstrarliga, verður helst neyðugt at seta tvey fólk aftrat í starv og at fáa sær serliga útbúgving/akkreditering til vega. Arbeiðseftirlitið eigur at arbeiða fram ímóti at fáa sama status sum FORCE, t.v.s. at verða akkrediterað av DANAK, sum er yvirskipaður myndugleiki á økinum. Harafturat kemur alt lógararbeiðið, sum helst eisini skal dagførast.

Mett verður ikki, at lógin í uppskoti hevur aðrar avleiðingar við sær, so sum avleiðingar fyri vinnuna, umhvørvið, serstøk øki í landinum, avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, ella sosialar avleiðingar.

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**
Við hesi grein verður yvirtøkan framd.

**Til § 2**
Fyri at tryggja, at stundir eru at avgreiða møgulig fyrisitingarlig ivamál, er gildiskomudagurin settur at verða ólavsøkudag 2008.

Í Tinganesi, 10. mars 2008

**Jóannes Eidesgaard**
løgmaður

/

Marjun Hanusardóttir
løgmansstjóri